# NORÐRAGØTA

FERÐSLUTRYGD OG GRØNT FRÍØKI
SKIPANARUPPSKOT



FEBRUAR 2020

Eysturkommuna

ÓSBJØRN JACOBSEN **ARKITEKTAR**

Fyri oman Brúgv 3
510 Gøta
Faroe Islands

Tel: +298 202500
E-mail: arkitektar@arkitektar.fo

# INNIHALD


| | |
|---|---|
| UPPGÁVAN | 4 |
| LÝSING AV VERANDI UMSTØÐUM | 6 |
| UPPSKOT | 8 |
| FERÐSLUTRYGD | 10 |
| ÚRSKURÐIR | 12 |
| NÝGGJAR UPPLIVINGAR | 16 |
| KOYRIBRÚGVIN | 20 |
| GØTUSAMBAND | 21 |
| DØMI UM VIÐAVØKSTUR | 22 |

## UPPGÁVAN

Uppgávan kann sigast at vera tvíbýtt, og fevnir um grøna økið framvið Eiðisá og kring vøllin, og ferðslutrygd og parkerinsviðurskiftir fram við vegnum (Við Ánna).

FRÍLENDISÆTLAN
- Økið kennist óskipað, og óneyðuga nógv asfalt er lagt,
- sera vindhart / avmarkað lívd,
- landsvegurin kennist dominerandi og er sera sjónligur,
- gøtan endar “ómotiverað” í báðum endum,
- parkerings og vega viðurskifti millum vøllin og ánna eru óskipaðið.

FERÐSLU OG PARKERINGSÆTLAN
- Gongubreyt manglar.
- Sýni er ov vánaligt í samband við vegkrossar.
- Bilar koyra í nógvum førum ov skjótt, og ferðslutarnandi tiltøk mangla.
- Vegurin kemur ov tætt at áarbakkanum og vegkanturin er ódefineraður.






YVIRLITSMYND//UPPGÁVUØKI



## VIÐ ÁNNA

LÝSING OG AVBJÓÐINGAR
Vegastrekkið Við Ánna hevur fleiri avbjóðingar.
Avbjóðingar eru við ferðslutrygdini í samband við útkoyringar og vegakrossar. Sýni er í nógvum førum ov vánaligt, samstundis sum ferðin á bilum, ið koyra Við Ánna ofta er ov høg.
Vegastrekkið tykist óskipað, og ongin kantsteinur er millum veg og áarbakka, og tí hevur áarbakkin í fleiri støðum tikið skaða av ferðslu og øðrum brúki. Báðu megin ánna, kemur vegurin ov nær áarbakkanum, og á norðaru síðuni, eru óskipaðir lummar fram við vegnum, ið vera nýttir til parkering og goymslu.



## GØTAN

LÝSING OG AVBJÓÐINGAR
Góð gøta er gjørd frá vøllinum og norður við ánni. Hesar vera nógv nýttar, og virka sum heild væl, tó kennist gøtan heldur “óvard” og uttan nakað stað at finna skjól frá vindinum, samstundis sum landsvegurin kennist órógvandi.
Norðari parturin av gøtuni endar í dag heldur “ómotiverað” í sjálvum bygdavegnum.



## VØLLURIN

LÝSING OG AVBJÓÐINGAR
Økið kring vøllin tykist óskipað, og er í stóran mun merkt av stóru asfalt/grús flatunum millum vøllin og áarbakkan. Økið ið verður nýtt sum koyribreyt er, har tað er breiðast, um 20 m breitt, og kemur ov nær áarbakkanum.

Parkeringin er sera óskipað norðanfyri og eystanfyri vøllin, og bilar standa fyri ein stóran part sum best ber til tá dystur er.
Partur av økinum er asfaltera, meðan restin er ósléttur eyrur, við nógvum hyljum tá tað regnar.

Vegamót við avmarkaðum útsýni




Økið er sera opið, og tí sera vindhart, og uttan nakað stað at finna lívd/skjól

Asfalt/eyr øki fram við áarbakkanum, upp til 20 m har tað er breiðast

DIAGRAM 1:5000


BREIÐKAÐUR
ÁARBAKKI
BUSSSKÝLIÐ
NÝGGJ
PARKERING
NÝGGJUR
VIÐAVØKSTUR
VERANDI
GRÚSGØTA
VÍÐKAÐUR
ÁARBAKKI
VERANDI
ÁARBAKKI




STØÐUMYND 1:2000




SKURÐUR AA 1-100




## Í DAG

Frá flestu síðuvegum er vánaligt sýni í samband við útkoyring á vegin framvið ánni, samstundis sum manglandi gongubreyt og ferðslutarn, ger at ferðin, á gjøgnumkoyradi ferðslu, ofta er ov høg.
Manglandi kantsteinur og gongubreyt, gera at vegastrekkið kennist ódefinerað og ótrygt hjá ferðandi til gongu og á súkklu.

Garðar og viðavøkstur taka sýni




## UPPSKOT

Gongubreyt á norðaru síðu, betrar um umstøður hjá teimum til gongu.
Fyri at betra um sýni hjá bilførarum, ið koma frá síðugøtunum, verður gongubreytin breiðka við vegamót, og ein lummi við aðrari álegging, gevur møguleika at sleppa longur fram í vegamótinum, áðrenn koyrt verður út á vegin framvið ánni.

Nýggja gøtan fram við áarbakkanum, á norðaru síðu á ánni, gevur møguleika at ganga ótarnaður av ferðsluni.

Nýggj gongubreyt

Nýggjur gonguteigur, ið er lyftur nakað í mun til vegin, hjálpir at tálma ferðini

Nýggj gøta fram við áarbakkanum

Dømi Óluvugøta




ÚRSKURÐUR PLAN 1:200




## ATGONGD OG UPPIHALD

Nýggju gongubreyt verður løgd í ovara borði, framvið vegnum við Ánna.
Har størru útkoyringar eru frá síðuvegum, vera fótgangateigir lagdir sum leiga tvørturum vegin til útvíðkaðu grúsgøtuna fram við ánni.
Fram við ánni eru á útvaldum støðum gjørdir uppihaldsmøguleikar við áarbakkan.
Viðavøkstur og hegn deila økið upp í smærri eindir, eins og tey virka lívdargevandi.


GONGUTEIGUR
CHAUSSÉSTEINAR
VEGBUNGA
VERANDI HOYGGJHÚS
GØTA
NÝGGJ P-PLÁSS
GONGUBRÚGV

PLAN 1:500




## SPÆL OG RØRSLA

Við útnyrðingshornið á verandi fótbóltsvølli, verður nýtt spæli og rørsluøkið gjørt, við smærri vallum og spæliplássi.
Hesi liggja ímillum viðavøkstur, ið er samansettur við skjóttvaksandi og harðførðum viðasløgum, ið trívast væl í Føroyum.
Vøksturin kemur við tíðini at deila stóra økið upp í minni og fjálgari økir, eins og tað sum heild skal vera við til at geva lívd, móti nógva vindinum og landsvegnum.

Í støðum verður áarbakkin reinsaður og víðkaður, og uppihaldspláss fram við ánni verða gjørd. Eisini verða tveir hólmar og gamli svimjihylurin partvís endurskaptir, og smáar grótslúsur vera gjørdar, soleiðis at smáðir hyljar vera ymsastaðni í ánni, eins og ferðin á vatninum lækkar tá áarføri er.


GONGUBREYT
URSKAPTUR ÁARBAKKI
KANTSTEINUR
ÐUR ÁARBAKKI
ENDURSKAPTUR ÁARBAKKI
VIÐAVØKSTUR//LÍVDARÁL
NÝGGJ P-PLÁSS
NÝGGJ P-PLÁSS
NÝGGJ P-PLÁSS
NÚVERANDI FÓTBÓLTSVØLLUR
VIÐAVØKSTUR//LÍVDARÁL
ENDURSKAPTUR HÓLMI

PLAN 1:500



**LJÓÐ**
Fjølbroytt ljóð - so sum vatnið í ánni, bløð og trø í bleiktra í vindinum, spælandi børn osfr. - hjálpir í mun til at taka fokus frá órógvi frá ferðsluni.

**ÚTSJÓND**
Skiftandi árstíðirnar, geva fjølbroyttar upplivingar alt árið.

**LÍVD**
Vøksturin skapar rúmligar upplivingar, lívd frá vindinum og hjálpir at skerma fyri gangi.

**FELAGSSKAPUR**
Økið, ið longu er eitt savningarstað í bygdini, fær enn fleiri tiltøk at savnast um, eins og umstøðurar kring vøllin, og í sjálvum dalinum, gerast betri.

**SPÆL OG RØRSLA**
Nýggju smærri vallirnir og spæliplássið, geva fleiri rørslu og spæli møguleikar, til bæði børn og vaksin.



Viðvøksturin og hegnið geva lívd, inndeiling og rúmligheit



Eitt fjølbroytt øki við ymiskum funktiónum og nýtslumøguleikum



Nyggj gongubreyt gevur betri ferðslutrygd fyri bæði tey til gongu og fyri koyrandi ferðsluna.
Gøtukervið framvið ánni verður víðka, og gevur enn betur atgongd til økið.
Parkeringsviðurskiftini verða skipaði betur, eins og fleiri nýggj parkingspláss vera gjørd.









## HEGNIÐ

Skotið verður upp at gera einføld pelahegn, sum skulu standa saman við nýggja viðavøkstrinum. Hegnið virkar bæði stuðlandi fyri vøksturin, og sum eitt rúmskapanadi element í økinum.
Ætlanin er at pelarnir vera settir í lendi, eins og vanligir stikpelar - og harvið koma teir at virka sum ein vælkend referensa frá traðarstykkjunum í grannalagnum.

## VØKSTURIN

Ætlanin er at viðavøksturin fyrst og fremst skal virka lívdargevandi á økinum, og tí er sera týdnaðarmikið at plantuvalið tekur útgangsstøði í trøðum og runnum, ið hava víst seg at trívast væl í føroyska verðurlagnum, og at tey eru harðfør og skjóttvaksnandi.
Mælt verður til at planta tætt frá byrjan, og so møguliga tynna út í vøkstrinum, so hvørt sum hann veksur seg til.



Dømi um náttúrligt tilfar og fjølbroyttar upplivingar



BRÚGVIN

Koyribrúgvin um Eiðisá, er í dag ikki serliga vøkur at líta á. Landsverk eigur brúnna, og krøv eru til verju o.a.
Tó kann hugsast at møguligt er at fríðka um brúnna, við eitt nú at hefta timburlamellir/rimar á uttaru síðuna, og harvið fjalda ógvusligu bilverjuna.









DØMI UM FRÍÐKAN AV BRÚNNI


Komandi útstykking
Komandi gøta
Bygdagøta
Møguligt framhald av verandi gøtu
Møguligt samband millum "ovara og niðara veg"
Bygdagøta
Møguligt framhald av verandi gøtu framvið fjørðuni
GØTUSAMBAND
Uppskot til útviðkan av gøtukervinum ímillum bygdirnar í komununi.

## STØKTRØ

DØMI UM VAL AV VØKSTRI OG PLANTUM

| | ÙTSJÓND | | LÝSING |
|---|---|---|---|
|  |  |  | Kontortafura<br>Pinus contorta<br>Stór- og breiðvaksið, veturgrønt nálatræ. Langar nálir. Helst hitt harðførasta nálatræið hjá okkum. Klárar seg í allari jørð, bert hon ikki er ov vát. |
|  |  |  | Japanskur lerkur<br>Larix kaempferi<br>Stórvaksið, leyvfellandi nálatræ. Nálirnar hava fagurgulan heystarlit. Best í djúpari, gloprutari jørð. Harðført, men veksur seint og krókut. Kann eisini hóska væl sum tættklipt runnagirðing. |
|  |  |  | Sitkagrann<br>Picea sitchensis<br>Stórvaksið, veturgrønt nálatræ. Nálirnar eru blágrønar við broddi. Hægstu trøini í Føroyum eru sitkagrann. Harðført. Trívist best í góðari jørð. |
|  |  |  | Suðurbók<br>Notofagus antarctica Miðalstórt, leyvfellandi træ. Toluliga harðført. Vakran greinbygnað og fagurtlitt leyv um heystið. |
|  |  |  | Sitkaelri<br>Alnus sinuata<br>Harðført, skjótvaksandi, miðalstórt leyvtræ. Verður ikki elligamalt træ. Rótin bindur køvievni úr luftini, og plantan bøtir tí serliga væl um jarðildið. Telist millum frægastu leyvtræssløgini hjá okkum. Hóskar væl sum stakvøkstur ella til lívdargirðing. |

# LÍVDARÁL/TRØ OG STÓRIR RUNNAR

## DØMI UM VAL AV VØKSTRI OG PLANTUM

| | ÙTSJÓND | | LÝSING |
|---|---|---|---|
|  |  |  | Dún Bjørk<br>Betula pubescens<br>Harðført og skjótvaksandi leyvtræ, ið verður miðalstórt. Hóskar væl bæði sum staktræ og í størri lívdarálum. Var upprunavøkstur í Føroyum fram til landnámstíðina. |
|  |  |  | Reyð Elri<br>Alnus rubra<br>Skjótvaksandi, miðalstórt leyvtræ. Rótin bindur køvievni úr luftini, og plantan bøtir tí serliga væl um jarðildið. Trívist best í eyrkendari jørð. Hóskar væl sum stakvøkstur ella til lívdargirðing. |
|  |  |  | Alaska Pílur<br>Salix alecensis<br>Høgur, skjótvaksandi, leyvfellandi runnur ella lítið træ. Upprent vakstrarlag. Skotini eru prúð og snøgg við døggkendum, bláligum dæmi. Bløðini eru eggvaksin ella øvut váknvaksin, kámt grøn á rættuni, filtloðin er hvít á ranguni. Blómar fyrri enn bløðini spretta. |
|  |  |  | Grápílur<br>Salix cinerea<br>Hávaksin, leyvfellandi runnur. Harðførur. Hóskar væl til runna- ella lívdargirðing. Eingi serlig krøv til jarðildið, men trívist best í góðari, tøðuríkari mold. Tolir væl at verða kliptur. |
|  |  |  | Skútupílur<br>Salix hookeriana<br>Høgur og harðførur skjótvaksandi, leyvfellandi runnur ella lítið træ. Hóskar væl til runna- ella lívdargirðing. Upprent vakstrarlag við dúnlodnum skotum. Tolir væl at verða kliptur. Trívst best í góðum sólargangi. Eingi serlig krøv til jarðildið. |

## LÍVDARÁL/BOTNVØKSTUR
DØMI UM VAL AV VØKSTRI OG PLANTUM

| | ÙTSJÓND | | LÝSING |
|---|---|---|---|
|  |  |  | Snjóber<br>Symphonicarpus albus<br>Miðalhøgur, leyvfellandi runnur. Harðførur og kravlítil. Smáar ljósareyðar blómur og hvít ber. Tolir væl skugga. Hóskar væl til klipta runnagirðing og undirvøkstur. Breiðir seg við rótskotum. |
|  |  |  | Dvørgfura<br>Pinus mugo<br>Lágvaksin, veturgrønur runnur/nálatræ. Seintvaksandi. Eingi serlig krøv til jarðildið, men veksur best í gloprutari jørð. Slagið tolir ikki skugga. Hetta slagið av fjallafuru verður bert runnakent. |
|  |  |  | Nýsælandsk kristtorn<br>Ilex aquifolium<br>Stórur, breiðvaksin, veturgrønur runnur. Stór grágrøn grovtent bløð, men uttan tornir. Blómurnar líkar summardáa, í stórum tyssum. Eldri runnar blóma væl. Hóskar væl til girðing. Eingi ávís krøv til jarðildið. Harðførur, tolir væl sjóráma. |
|  |  |  | Arktiskur Pílur<br>Salix arctica<br>Lágvaksin, leyvfellandi runnur. Harðførur. Hóskar væl til steinbeð ella laðing. Tolir væl at verða kliptur. Ljóskrevjandi. Eingi serlig krøv til jarðildið. |
|  |  |  | Kaprifolia<br>Lonicera caprifolium<br>Miðalstórur, leyvfellandi runnur. Harðbalin. Nýtiligur bæði sum einsamallur runnur, girðing, klívplanta og lívdál. Tolir eisini skugga. Blómurnar eru tvílittar, gular við reyðum í. Fruktin er svørt ber. |
|  |  |  | Baraldur<br>Juniperus communis<br>Veturgrønur, krúpandi runnur. Trívist best í turrari jørð og góðum sólargangi. Fruktin gerst blá, tá ið hon er staðin sum 2-3 ára gomul, og er m.a. vældámd kryddurt. Hetta er einasta slagið av nálatrøum, ið<br>natúrliga veksur í Føroyum. Hevur vaksið her síðan ístíðina. |

# BLÓMANDI RUNNAR

DØMI UM VAL AV VØKSTRI OG PLANTUM

| | ÙTSJÓND | | LÝSING |
|---|---|---|---|
|  |  |  | Fjallaribes<br>Ribes alpinum<br>Miðalhøgur, leyvfellandi runnur. Tunnar greinar og hangandi vøkstur. Gulgrønar blómur. Harðførur. Tolir serliga væl skugga. Tolir væl at verða kliptur. |
|  |  |  | Havtorn<br>Hippophaë rhamnoides<br>Leyvfellandi, miðalhøgur runnur. Bløðini eru grálig á liti. Breiðir seg við rótskotum. Fruktirnar eru serliga ríkar av C-vitaminum. Serliga ljóskrevjandi. Trívist best í leysari sand- ella grúskendari jørð. Tolir væl sjórok. Harðførur. Bindur køvievni úr luftini. |
|  |  |  | Hyllirunnur<br>Sambucus nigra<br>Hávaksin, harðførur, leyvfellandi runnur. Tolir væl slitvind. Blómar væl, blómurnar hvítar. Fær vanliga ikki búgvin ber hjá okkum. Trívst best í lættari jørð og góðum sólargangi. |
|  |  |  | Tornarunnur<br>Ulex minor<br>Tættvaksin, miðalhøgur runnur við sera nógvum tornum. Gular blómur. Tolir væl sjórok og vindslit. Trívist best í turrlendi og góðum sólargangi. Úr Europa. |
|  |  |  | Hvítblømd brigdurósa<br>Rosa rogusa ('Alba')<br>Miðalhøgur leyvfellandi runnur við tornum. Upprent vakstrarlag. Breiðir seg við rótskotum. Bløðini grøn. Blómurnar hvítar, angandi.<br>Blómar væl. Kann fáa væl av reydligum hjúpum (hyben) um heystið. Ein hin harðførasti runnur í Føroyum. Eigur at tilskerast tíðum. |